# 900 dagar við forvitni og søgu

**Í nýggju bókini hjá Jústinusi Leivsson Eidesgaard um tíð hansara í Singapore, frætta vit um søguna hjá Singapore. Um, hvussu ein deknur trívist sum "shippingmaður", og eitt sindur um, hvussu tað er at vera so langt burtur heiman**

UMMÆLI
*Edvard Joensen*

Eg minnist, hvat eg hugsaði, tá eg á táverandi felags arbeiðsplássi okkara, Jústinusar og mínum, frætti, at Jústinus skuldi til Singapore at vera hjálparmaður í sjómanskirkjuni. Eg ynskti, at tað var eg, sum fekk hendan møguleikan. Og eftir at hava lisið bókina "900 dagar í Singapore", er ikki sørt, at tann hugurin er við at vakna aftur.

Hendan bókin er tann triðja, eg siti við frá Jústinusar hond, hesi seinastu trý árini. Og eins og hinar báðar fyrru, tær um Kaj Johannesen, er hendan ein frásøga við tí besta av kynstrinum, Jústinus klárar at borðreiða, Og tað er ikki so lítið.

Eg meti Jústinus sum ein í tí frægara endanum til frásøgukynstur, eins og hann sum eygleiðari er millum teir bestu. At seta hesi bæði, eygleiðing og frásøgu saman, er hann óførur, og tí verður tað eisini bæði stuttligt og spennandi at lesa tað, hann skrivar. Eisini er Jústinus áhugaður í søgu og veit væl, sum eisini gongur aftur í hesi bókini, tó at eg sanni, at tað kann tykjast eitt sindur einstáttað, at mestsum alt tað søguliga tilfarið, sum er nógv, er bygt á frásøgn hjá "landsfaðirinum", Harry Lee Kuan Yew, sum stýrdi Singapore í eitt mannaminni.

Tú fært ikki annað enn sett tær spurningin, um nú alt er so, og bert so, sum maðurin sjálvur sigur tað vera. Og hóast Jústinus vísir á júst hendan ivan, er tað ikki sørt, at tú sum lesari hevur eitt sindur av somu kenslu, sum tá lisið verður úr søgubókum Josefusar Flavius, har hann sjálvur viðhvørt er høvuðspersónurin í tí, sum hendir. Tað kann leggja eitt sindur av "skepsis" eftir seg.

Men ikki skerst burtur, at júst hesin táttur Jústinusar, at taka eitt slíkt verk sum tað hjá Lee og mestsum grunda bók sína á tað, ger, at lesarin, sum heilt vist ikki kennir so nógv til Singapore annað enn, at býurin er nevndur í sanginum "Í góðum veðri hann dyrgdi" og onkuntíð í skipalistunum, sum fyrr vórðu lisnir í Útvarpinum, fær eina rúgvu av annars ókendum tilfari at lesa.




### Bygnaðurin

Bókin er skipað eitt sindur øðrvísi, enn flestu føroyskar bøkur annars, soleiðis at skilja, at hon fylgir ikki eini neyvari søgugongd frá fyrsta til seinasta dag í Singapore, hóast hon byrjar við ferðini til Singapore og endar við seinasta útisetabrævinum.

Hon er bygd yvir tey útisetabrøvini, høvundin skrivaði til Útvarp Føroya, ta tíðina, hann var í Singapore, saman við tilfari burtur úr endurminningum Lee Kuan Yew's og egnum eygleiðingum.

Høvundin sigur í bókini, at hann er hugtikin av týska rithøvundanum Günther Grass, sum dugir tað kynstrið at skriva bøkur, har innihaldið sveimar í eystur og vestur, uttan at tað nervar lesaran. Hetta sama hevur Jústinus eftir øllum at døma sett sær fyri at royna, og satt at siga tykir mær, at tað hevur eydnast rímiliga væl. Kanska tí, at hann longu á blaðsíðu 35 ávarar um, at hann fer at gera soleiðis.

So vita vit, meðan vit lesa, hví hann skiftir frá einum útsetabrævi frá 1997 til eina krígssøgu frá 1943 og aftur ella í hvussu er hálva leið heimaftur.

### Eygleiðingarnar

Journalisturin í Jústinusi fjalir seg ikki í bókini. Hansara forvitni og eygleiðaraevni koma týðuliga til sjóndar í øllum tí, hann sjálvur sigur frá. Tá eg sigi so, er tað tí, at tað, hann skrivar eftir endurminningunum hjá Lee, meti eg sum umsetta endurgeving, sum tó eigur sín fulla rætt í bókini, tí tað gevur lesaranum eina "óvurderiliga" fatan av tí, sum sagt verður frá, og um søguna hjá býnum.

Og so hesar sammetingarnar við viðurskiftini í Singapore og Oyndarfirði og aðrastaðni í Føroyum, sum vit alla tíðina fáa serveraðar. Her melur alt hvørt um annað. Hvussu Singaporebúgvar eta livandi rækjur og svínavomb, eins og hvussu tað er at eta grind í tropuhita.

Men einaferð varð hann tó settur mát, okkara fráliki frásøgumaður úr Oyndarfirði. Hann setti seg ikki, eftir egnari frásøgn, føran fyri at greiða kinesarum í tropunum frá føroyskum kjøtterra. Og eg, sum helt, at hann uttan nakað sum helst kundi fáa hvønn sum helst at trúgva hvørjum helst.

### Løtt at lesa

Bókin er sum annars lesnaður hjá Jústinusi løtt at lesa. Tað, at hon er bygd upp við stuttum kapitlum, har journalistiski stílur hansara er eyðsýndur, ger hana bara uppaftur lættari. Og tær nógvu myndirnar gera bókina sera forvitnisliga.

Myndirnar eru, sum restin av innihaldinum, eisini sera blandaðar og spjaddar soleiðis hissini yvir síðurnar. Tó er ein linja, sum er greið. Litmyndirnar hevur høvundurin sjálvur tikið, og tær svart/hvítu myndirnar eru slíkar, hann hevur ognað sær aðrar vegir. Sum skilst nógvar á ýmsum marknaður og sølutorgum í Singapore, eins og onkur eisini er úr onkrari bók, hann vísir til. Nágreiniligur myndatekstur er til myndirnar, Tó tykist onkuntíð, sum minnið hevur spælt høvundanum eitt puss, tí tað kemur nakrar ferðir fyri, at hann ikki minnist aftur nøvnini á teimum persónum, hann hevur á myndunum.

Allar hesar myndirnar av fólki, sum hesar dagarnar vitjaði sjómanskirkjuna og høvundan og familju hansara heima í Singapore, gera eisini bókina áhugaverda og geva eina ábending um, hvussu víða og nógv føroyingurin ferðast. Bæði til arbeiðis og stuttleika.

Aftast í bókini er listi við notum, víst verður til, eins og bókmentalisti og kut úr gestabók høvundans, har til ber at síggja, nær tey ymsu fólkini, vit síggja á myndunum, hava verið í Singapore. Eisini tey hava sína søgu, sum broytist við tíðini, sum hjá so mongum øðrum.

Jústinus hevur sett sær fyri, sigur hann, at fáa bókina týdda til enskt mál og givna út í Singapore. Kann vera, at onkur har eysturi fer at halda tað vera eitt gott hugskot.

Hjá okkum er hon komin á føroyskum við 382 blaðsíðum, sum kosta 399,- krónur, ið eftir mínum tykki er væl givnar fyri hesa bókina.

# Eitt orð í dag

**Forvitnislig bók við lestrum eftir norska prestin Ludvig Hope. Kristian Osvald Viderø prestur týddi. Bókagarður gevur út**

TÍÐINDASKRIV




Ludvig Hope (1871-1954) var nógv umhildin prædikumaður og virkaði m.a. sum skrivari í Norsk Luthersk Misjonssamband

Ein sjáldsom og fyri mong áhugaverd bók er júst komin á føroyska bókamarknaðin. Hetta er lestrabókin »Eitt orð í dag« eftir norska prestin, høvundin og hugsjónarmannin Ludvig Hope, sum livdi frá 1871 til 1954.

Í bókini eru lestrar til hvønn dag í árinum, og byrjað verður 1. januar. Fyri nøkrum árum síðan vórðu hesir somu lestrar lisnir í Útvarpi Føroya. Tað er forlagið Bókagarður, sum gevur lestrabókina út.

Ludvig Hope var íðin stríðsmaður fyri leikmannarørsluni og varð m.a. kendur fyri at hava sagt, at leikmonnum skuldi verða loyvt at stíla fyri altargongd. Hann var ein sera virkin kristin, bæði sum talari og høvundur, og hann var við til at stovna fleiri kristnar felagsskapir í Noregi, eitt nú Kristent Samråd. Undir seinna heimsbardaga var hann virkin í stríðnum ímóti týska hersetingarvaldinum. Í 1943 handtóku týskarar hann og ein annan kendan norðmann, Hallesby, og frá mai til august sótu teir í varðhaldi á Grini.

Bókin »Et ord i dag« við lestrum til hvønn dag í árinum, kom út í Bergen fyrstu ferð í 1930. Ein donsk týðing kom í 1954, og tað er henda, sum Kristian Osvald Viderø hevur nýtt sum grundarlag undir síni týðing. Málið er tað serstaka forna og hátíðarliga, sum Kristian Osvald eisini er so kendur fyri.

Hjá teimum, ið hava kunnleika, og øðrum, sum vilja kunna seg meira um hetta serstaka forna mál, er henda bók ein dýrgripur.

# Páparnir skulu hava longri barsilsfarloyvi

**Danskar kvinnur ynskja, at menninar fara longri í barsilsfarloyvi**

JAVNSTØÐA
*Rigmor dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Danskar kvinnur eru meira positivar enn menninir fyri at seta eitt longri tíðarskeið av barsilsfarloyvinum av til pápanir, vísir ein nýggj kanning. Serfrøðingar halda, at tað hevði merkt, at nógv fleiri pápar brúktu farloyvið, um ein størri partur var settur av til teirra.

Kvinnur hava 14 vikur barsilsfarloyvi eftir føðing og menn hava 2 vikur. Harumframt eru 32 vikur, sum tey kunnu býta sínamillum eftir egnum ynski.

Av samlaða barsilsfarloyvinum kunnu donsk foreldur í dag frítt velja – ella stríðast um – hvussu tey býta tær 32 vikurnar við dagpengum sínamillum. Yvir 4 av 10 kvinnum eru tó við uppá at gera valið eitt sindur minni frítt. Tær halda, at eitt longri tíðarskeið av farloyvinum skal oyramarkast til pápan, sum mamman væl at merkja ikki skal kunna yvirtaka. 38% av kvinnunum eru ímóti hesum, meðan restin ikki hevur tikið støðu. Menninir eru meira ivasamir. 46% eru ímóti, 37% fyri, og restin veit ikki.

Sum er, eru danskir menn í miðal 18 dagar í barsilsfarloyvi. Í mongum førum er orsøkin til, at kvinnurnar taka meginpartin av farloyvinum tann, at menninir hava hægstu inntøkuna, og tískil loysir tað seg betur, at kvinnan tekur mest farloyvi, skrivar javnstøðunevndin á heimasíðuni www.javnratt.fo